gult cyan magenta svart
gult cyan magenta svart

Myndir: Jens Kr. Vang

Spjadda baklandi› er nú savna›

***Interview:** Ta› hevur veri› trupult, men spennandi at veri› forma›ur í Javna›arflokkinum, sí›ani fullveldismáli› kom ovast á dagsskránna, ásannar Jóannes Eidesgaard. Orsøkina sigur hann vera, at limirnir í Javna›arflokkinum hava nógv spjaddari stø›u til máli› enn Sambandsflokkurin og Tjó›veldisflokkurin*

John Johannessen

Í Javna›arflokkinum eru bæ›i sambandssinna› og fullveldissinna› fólk. Tí er trupult at vera forma›ur í júst hesum flokkinum, tá fullveldismáli› stendur ovast á dagsskránni.

Hetta ásannar Jóannes Eidesgaard, sum sí›ani 1996 hevur veri› forma›ur floksins.

Jóannes Eidesgaard vísir á, at Javna›arflokkurin og Tjó›veldisflokkurin hava hvør sítt grundstø›i at byggja á.

– Í Javna›arflokkinum er pláss fyri sjálvst‡rissinna›um, minni sjálvsst‡rissinna›um og sambandssinna›um fólkum. Ta› sum savnar javna›arfólk er hugsjónin um at skapa liviumstø›ur til vanliga føroyingin.

– Í Tjó›veldisflokkinum er pláss fyri borgarligum, minni borgarligum og vinstrahallum. Ta› sum savnar tjó›veldisfólk er hugsjónin um at skapa l‡›veldi› Føroyar, vísir Jóannes Eidesgaard á.

Tí heldur Jóannes Eidesgaard ta› vera nógv lættari hjá Sambandsflokkinum og Tjó›veldisflokkinum at hava eina grei›a stø›u til ríkisrættarliga spurningin.

– Hjá Tjó›veldisflokkinum og Sambandsflokkinum sn‡r ta› seg um ja og nei. Antin at vera fyri ella ímóti. Men Javna›arflokkurin, sum liggur ímillum, skal grei›a frá síni stø›u í setningum, og ta› er verri, sigur Jóannes Eidesgaard.

Somu trupulleikar sum Javna›arflokkurin, heldur Jóannes Eidesgaard, at Fólkaflokkurin eigur at hava.

Sjálvst‡rissinna›ur

Forma›ur Javna›arfloksins vísir á, at Javna›arflokkurin, sí›ani hann var› stovna›ur í 1925, hevur veri› ein sjálvst‡rissinna›ur flokkur. Og Petur Mohr Dam var sjálvur ein rættuliga sjálvst‡rissinna›ur ma›ur.

Fleiri av teimum, sum vóru vi› til at stovna Javna›arflokkin, komu úr Sjálvst‡risflokkinum. Tískil var ta› heilt náttúrligt, at limirnir í Javna›arflokkinum vóru sjálvst‡rissinna›ir.

– Men í Javna›arflokkinum hevur altí› veri› og skal eisini altí› vera pláss fyri ø›rum, i› ikki eru so sjálvsst‡rissinna›. Tí ta› er hugsjónin um vælfer›arsamfelagi›, i› fylkir flokkin, sta›festir Jóannes Eidesgaard.

»Í Javna›arflokkinum er pláss fyri sjálvst‡rissinna›um, minni sjálvsst‡rissinna›um og sambandssinna›um fólkum. Ta › sum savnar javna›arfólk er hugsjónin um at skapa liviumstø›ur til vanliga føroyingin«

Sum eitt av søguligu dømunum um, at javna›arfólk hava veri› sjálvst‡rissinna› nevnir Jóannes Eidesgaard málstrí›i›. Í málstrí›num bardust nógvir javna›armenn fyri føroyska málinum. Millum hesar vóru He›in Brú og Martin Joensen, i› eru tveir av mætastu føroysku rithøvundunum.

Strí›i› í dag sn‡r seg um fullveldi ella ikki fullveldi.

Hesum hevur Javna›arflokkurin veri› noyddur at tiki› vi› og havt eina stø›u til. Og júst ta› hevur veri› trupla stø›an hjá formanninum, i› skal koma vi› einari grei›ari útmelding frá einum baklandi, i› er ógvuliga spjatt í hesum máli.

– Hetta hevur ofta gjørt stólin hjá mær ógvuliga heitan, og ikki hevur altí› veri› lætt at vera forma›ur floksins í hesum tí›arskei›i. Ta› hevur harafturímóti ofta veri› ógvuliga trupult, sigur Jóannes Eidesgaard.

Fyri at gera ta› lættari at fáa eina grei›a útmelding, valdi Javna›arflokkurin at halda eykalandsfund í februar.

– Á hesum fundi funnu vit eina samtykt, i› savnar flokkin, og er ta› eftir henni, vit í dag arbei›a, vísir Jóannes Eidesgaard á.

Forma›ur Javna›arfloksins ásannar tó, at ta› enn væl ber til at finna tvey javna›arfólk, i› eru rættuliga ósamd um ríkisrættarligu stø›una.

Sjálvst‡risuppskoti› savnar

Javna›arflokkurin gjørdi á›renn seinasta val eitt sjálvst‡risuppskot, i› sn‡r seg um at yvirtaka málsøki frá Danmark, so hvørt vit eru før fyri tí, solei›is at vit at enda hava fult ræ›i innan øll málsøki, men kortini eru í ríkisfelagsskapinum.

Hetta uppskoti› heldur Jóannes Eidesgaard framvegis vera røttu loysnina, sum limirnir í flokki hansara eisini taka undir vi›.

– Sjálvst‡risuppskoti› er ein alternativ loysn til fullveldismáli› hjá samgonguni. Og ta› kann væl brúkast sum grundarlag fyri at finna n‡ggja semju millum flokkarnar í Føroyum fyri at seta hol á ríkisrættarliga spurningin av n‡ggjum, sigur Jóannes Eidesgaard.

Sjálvst‡risuppskoti› leggur, sum Jóannes Eidesgaard fatar ta›, upp til nakrar konkretar loysnir í einum n‡ggjum sáttmála vi› Danmark.Ta› sigur naka› um innihaldi› í sáttmálanum, hvussu sáttmálin kann sigast upp, naka› um heimarætt og so fram vegis.

Dreyminum um, at hetta ver›ur uppskoti›, i› loysir ríkisrættarliga spurningin, hevur Jóannes Eidesgaard ikki slept.

Tá teir tríggir samgonguflokkarnir í 1998 skriva›u undir samgonguskjali›, seg›i Jóannes Eidesgaard seg kunna taka undir vi› fyrstu sí›u í samgonguskjalinum.

Hesa fatan hevur Jóannes Eidesgaard enn. Hann heldur restina av samgonguskjalinum vera ta› mest borgarliga samgonguskjali›, nakrantí› er skriva›. Men sí›a eitt er í lagi, sæ› í ljósinum av restini.

– Javna›arflokkurin tekur undir vi›, at vit taka yvir málsøki, eins og vit eisini yvirtaka umsitingina av teimum. Vit skulu hava fulla ábyrgd – eisini fíggjarliga, ger Jóannes Eidesgaard greitt.

Men kortini er naka›, i› skilir Javna›arflokkin frá samgonguni. Javna›arflokkurin tekur ikki undir vi› tí leisti, samgongan førir

í spurninginum um at fáa sjálvst‡ri.

– Samgongan vil hava loysing frá Danmark og sí›ani arbei›a fram ímóti at Føroyar skulu klára seg sjálvar. Javna›arflokkurin vil, at vit skulu arbei›a fram ímóti at klára okkum sjálv, og tá vit klára ta›, skulu vit ver›a sjálvstø›ug, men ikki fara úr ríkinum, sigur Jóannes Eidesgaard.

– Tá vit vi› positivum eygum royndu at finna naka› gott í samgonguskjalinum, funnu vit út av, at vit kundu taka undir vi› pørtum av fyrstu sí›u. Og vit kundu eisini fylgja samgonguni ein part av vegnum í sjálvsst‡ristilgongdini. Men vit kunnu als ikki taka undir vi› politikkinum, nú ver›ur førdur, sta›festir forma›ur Javna›arfloksins.

Fornerma›i Jóannes

Sí›ani Jóannes Eidesgaard rættuliga fór at gera vart vi› sína mótstø›u móti fullveldispolitikki samgongunnar, er hann í politiskum vi›merkingum í blø›unum og millum manna javnan skírdur at vera fornerma›ur og gronutur.

Eisini hevur onkur givi› hugtakinum morgungrun navni› Eidesgaard, og onkur er farin so langt, sum at kalla Jóannes Eidesgaard landasvíkjara og høgra hond hjá donsku imperialistunum.

Men hetta darvar kortini ikki Jóannes Eidesgaard stórvegis.

– Eg var landsst‡risma›ur í kreppuárunum fyrst í nítiárunum. Tá var eg dagliga úti fyri ágangi. So eg haldi, at eg kann siga, at eg eri vanur vi› ákoyringar, sigur Jóannes Eidesgaard.

Jóannes Eidesgaard heldur seg vita eina frágrei›ing til ágangin í fullveldismálinum.

– Eg minnist, at Turi› Debes Hentze í einari av Spyr Bara sendingunum vísti á, at sjálvt or›i› fullveldi› er so miki› positivt or›, at tá onkur talar ímóti tí, ver›ur átalan fata› sum grenj. Hetta haldi eg, at hon hevur rætt í, sigur Jóannes Eidesgaard.

Men grenj ella ei. Jóannes Eidesgaard heldur seg sum formann fyri Javna›arflokkin hava skyldu til at vísa á vansar og skeivleikar vi› fullveldisætlanini, og ta› ætlar hann sær at halda fram at gera.

Mugu finna loysn

Samgongan og fullveldistilgongdin hava nú vart í hálvttri›ja ár og valskei›i› er fari› at halla. Enn er tó eingin endalig loysn funnin á ríkisrættarligu stø›uni.

Júst hetta heldur Jóannes Eidesgaard vera ein trupulleika. Nevniliga tí, at fullveldismáli› hevur fylt so nógv av politiska hugaheiminum í Føroyum, at pláss hevur ikki veri› fyri ø›rum álvarsmálum.

Tí heldur Jóannes Eidesgaard ta› vera ney›ugt at finna eina loysn á ríkisrættarliga spurninginum. Men ta› skal kortini ikki vera ein loysn, sum ver›ur skrumbla› ígjøgnum.

– Eg haldi, at samgongan hevur sæ› í eyguni, at lítil tí› er eftir at fáa avklára› fullvedismáli›, og tí roynir hon í løtuni vi› brøvum til ST og NATO at skapa órógv í máli›, solei›is at fer› kemur á júst fullveldisætlanina, sigur Jóannes Eidesgaard.

Men hetta vónar forma›urin í Javna›arflokkinum ikki fer at eydnast.

– Eg rokni vi›, at máli› um ríkisrættarligu stø›una helst ikki ver›ur loyst fyrr enn eitt val hevur veri›, i› kann reinsa politisku luftina, solei›is at farast kann undir máli› av n‡ggjum, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hev›i Javna›arflokkurin gjørst partur av einari n‡ggjari samgongu, hev›i sjálvst‡ristilgongdin kortini ikki veri› tikin av politiska breddanum.

Heldur hev›i ta› enn einafer› komi› ovast á breddan, men í mildari líki, enn hjá verandi samgongu. Tá hetta sí›ani var› avgreitt, hev›i Javna›arflokkurin fari› undir realpolitikk, sum í stórum stíla vantar í Føroyum í dag, ger Jóannes Eidesgaard greitt.

Um samstarvi›, sum í løtuni er millum Sambandsflokkin og Javna›arflokkin, sigur Jóannes Eidesgaard, at Javna›arflokkurin sanniliga ikki er Sambandsflokkurin nummar tvey.

– Heldur er Sambandsflokkurin á veg at gerast Javna›arflokkurin nummar tvey, sigur Jóannes Eidesgaard.

»Strí›i› í dag sn‡r seg um fullveldi ella ikki fullveldi. Hesum hevur Javna›arflokkurin veri› noyddur at tiki› vi› og havt eina stø›u til. Og júst ta› hevur veri› trupla stø›an hjá formanninum, i› skal koma vi› einari grei›ari útmelding frá einum baklandi, i› er ógvuliga spjatt í hesum máli«

»Javna›arflokkurin tekur undir vi›, at vit taka yvir málsøki, eins og vit eisini yvirtaka umsitingina av teimum. Vit skulu hava fulla ábyrgd – eisini fíggjarliga«

»Eg var landsst‡risma›ur í kreppuárunum fyrst í nítiárunum. Tá var eg dagliga úti fyri ágangi. So eg haldi, at eg kann siga, at eg eri vanur vi› ákoyringar, sigur Jóannes Eidesgaard«